*Ársroknskapurin hjá Tryggingarfelagnum:*

# Íløguaktivini tryggjaðu avlopið

*Fyri fyrstu ferð í mong ár hevði Tryggingarfelagið Føroyar hall av sjálvum tryggingarvirkseminum. Kortini var avlopið í fjør upp á knappar 46 mió. krónur og tað stavar alt sum tað er frá íløguaktivunum, sum sambært ársroknskapinum nú eru meiri enn 1.2 mia. krónur*



*Hóast raksturin av Tryggingarfelagnum Føroyar ikki gekk so væl, sum leiðslan kundi hugsað sær, so var úrslitið eitt avlop upp á góðar 45 mió. krónur. Men yvirskotið stavar frá vinningi av íløguaktivunum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tryggingarfelagið Føroyar hevði hall upp á 17,3 mió. krónur av tryggingarvirkseminum í 1999.

Kortini var avlopið fyri seinasta roknaksaparár upp á knappar 46 mió. krónur, og orsøkin til tað er, at Tryggingarfelagið Føroyar kundi staðfesta ein vinning upp á góðar 65 mió. krónur av íløguaktivunum.

**Hall á øllum deildum**

Í ársfrágreiðingini frá leiðsluni verður sagt, at Tryggingarfelagið fyri fyrstu ferð, síðani fyrst í nítiøarunum mátti staðfesta hall av tryggingarvirkseminum.

Seinastu árini hevur vinningurin av tryggingarvirkseminum verið ein fjórðingur av samlaða vinninginum, meðan hinir tríggir fjórðingarnir eru komnir frá vinningi av íløguaktivum.

Soleiðis skuldi ikki ganga í 1999 og endin var eitt hall av tryggingarvirkseminum upp á 17,3 mió. krónur.

Sambært ársfrágreiðingini var hall á øllum tryggingarøkjum uttan á bólkinum aðrar tryggingar, sum hevði ein vinning ipp á 2,1 mió. krónur.

Tann tyngsta deildin hjá Tryggingarfelagnum hevur sum oftast verið akfarstryggingar, og í so máta var árið í fjør einki undantak.

Hallið av akfarstryggingum var í fjør 9,6 mió. krónur og tað vil siga, at hallið av akfarstryggingum umboðar umleið helmingin av samlaða hallinum.

Orsøkin til hallið á akfarsdeildini er ein ógvuslig øking í skaðatalinum, sum vaks úr 3.282 til 3.981. Hetta er ein øking upp á 699 skaðar og tað er nógv. Eisini um hugsað verður um, at Tryggingarfelagið Føroyar við árslok 1999 hevði 1.800 fleiri akfør skrásett í sínum skráum enn árið frammanundan.

**Stórt kurstap**

Hóast tað vóru íløguaktivini, sum í fjør tryggjaðu Tryggingarfelagnum Føroyar avlopið á niðastu linju í roknskapinum, so var úrslitið av íløguaktivunum rættuliga nógv verri í fjør sammett við 1998.

Tá góvu íløguaktivini eitt íkast til roknskapin upp á knappar 84 mió. krónur, men í fjør var hesin vinningur svunnin til góðar 65 mió. krónur.

Orsøkin til hetta er, at Tryggingarfelagið, eins og øll onnur, sum arbeiddu á virðisbrævamarknaðinum í 1999, máttu staðfesta kurstap móti kursvinningi árið fyri.

Rentan hækkaði á virðisbrævamarknaðinum og tað hevur við sær kursfall, sum eitt nú Tryggingarfelagið merkir sera væl. Felagið hevur uml. 750 mió. krónur standandi í virðisbrøvum, og tá skulu ikki so stórar kursbroytingar til áðrenn tær merkjast.

Kurstapið hjá Tryggingarfelagnum var í 1999 góðar 16 mió. krónur ímóti einum vinningi upp á góðar 5 mió. krónur. Samanlagt ein afturgongd upp á knappliga 22 mió. krónur.

**Nógv fleiri skaðar**

Orsøkin til tað vánaliga rakstrarúrslitið er, sum nevnt frammanfyri, nógv fleiri skaðar.

Samanlagt fekk Tryggingarfelagið 2000 fleiri skaðafráboðanir í 1999 enn í 1998, harav 699 av teimum, sum nevnt frammanfyri, vóru bilskaðar.

Hetta merkir, at skaðabøturnar fyri árið 1999 vuksu við 53 mió. krónum til 190 mió. krónur. Skaðabøturnar fyri egna rokning vuksu við 47 mió. krónum til 172 mió. krónur.

Av hesum 47 mió. krónunum stava 16 mió. frá sjóvátryggin, 15 frá akfarstryggingum og 8 frá vanlukkutryggingum.

Sjódeildin mátti í fýra førum rinda fulla tryggingarhædd tí skip antin gingu burtur ella brunnu.

**Stór eginogn**

Hóast tað ikki gekst heilt eftir vild í 1999, so er eingin ivi um, at Tryggingarfelagið Føroyar framhaldandi er eitt sterkt felag.

Roknskaparárið 1999 var tað næsta síðani felagið varð lagt saman, men kortini tað fyrsta heila roknskaparárið hjá nýggja felagnum.

Tað eru tó nogv ár síðani Tryggingarsambandið var stovnað og roknskaparárið var tað 60. í røðini síðani Tryggingarsambandið Føroyar varð stovnað.

Eginognin hjá felagnum er stór og solvensurin hjá felagnum góður.

Eginognin var við árslok 1999 góða 1,1 mia. krónur og solvensurin 29 ferðir lógarkravið.

# Rusknøgdin bara økist

*Seinastu tvey árini er rusknøgdin til Brennistøðina hjá IRF økt við knøppum 30 prosentum, sum svara til uml. 4.500 tons. Hetta stendur at lesa í ársfrágreiðingini til roknskapin hjá felagnum, sum vísir eitt avlop upp á góðar 3,3 mió. krónur, sum er umleið 300 túsund minni enn í 1998*



*Fyri nøkrum døgum síðani hevði IRF aðalfund, har m. a. roknskapurin varð lagdur fram til góðkenningar. Avlop fyri 1999 var góðar 3,3 mió. krónur, sum er á leið tað sama sum í 1998*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

SVEINUR TRÓNDARSON

IRF hevði eitt avlop uppá góðar 3,3 mió. krónur í 1999. Hetta er eitt sindur minni enn árið fyri tá úrslitið var góðar 3,6 mió. krónur.

Inntøkurnar hjá felagsskapinum øktust við knappliga 3 mió. krónum í fjør og sambært ársfrágreiðingini stava meirinntøkurnar í høvuðsheitum frá virkjum.

Hóast fleiri inntøkur, sæst tað ikki aftur á botnlinjuni, tí samstundis sum inntøkurnar øktust, øktust eisini útreiðslurnar.

Meirútreiðslurnar stava serliga fra´øktum lønarútreiðslum, flutningsútreiðslum og øktum útreiðslum til jarnútflutning.

**Á rættari leið**

Tað hevur ikki altíð verið so hugaligt at hava við IRF at gera, tí tað gekk meiri enn striltið fyrstu árini.

Í 1992 hevði felagsskapurin eitt hall upp á góðar 28 mió. krónur, men síðani 1994 hevur gingið rættan veg.

Inntøkurnar eru øktar nógv, og serliga er tað tann parturin sum eitur aðrar inntøkur, sum eru øktar serliga nógv.

Í 1992 vóru samlaðu inntøkurnar knappar 31 mió. krónur, og bert tríggjar teirra stavaðu frá øðrum inntøkum.

Í fjør vóru inntøkurnar góðar 47 milliónir, og nú stava knappliga 15 milliónir frá øðrum inntøkum - sum serliga eru virkir.

Henda positiva gongd sæst tí eisini aftur á eginognini, sum nú er góðar fýra milliónir. Tó skal ein hava í huga, at samlaðu aktivini hjá felagsskapinum er upp á knappar 98 mió. krónur, og tí er ein eginogn uppá 4 mió. krónur ikki serliga nógv.

**Rusknøgdin nógv økt**

Orsøkin til, at tað nú melur runt fíggjarliga hjá brennistøðini er sjálvsagt, at støðin hevur nógv meira rusk at brenna.

Síðani 1991 er nøgdin, sum brend er, økt úr uml. 12.500 tonsum til knappliga 20 túsund tons. Sum vera man var ein niðurgongd í kreppuárunum, men hetta er so ruddiliga komið aftur og væl tað.

Í 1993, tá brenda nøgdin var minst, Brendi IRF uml. 11 túsund tons. Seinastu tvey árini er nøgdin sambært ársfrágreiðingini økt við knappliga 30 prosentum.

Hóast vaksandi nøgdir, so er støðan hjá felagsskapinum ikki nóg góð fíggjarliga.

Leiðslan sigur, at við tí virksemi, sum IRF hevur í dag, skal gjaldførið helst vera í minsta lagið 3 milliónir. Tí verður neyðugt at hækka limagjaldið fyri hvønn íbúgva við 50 krónum til 1.090 krónur. Hetta verður gjørt frá 2001.





*Elsa Birgitta Petersen sigur, at hon veit, at onkur lærari tekur undir við semingsuppskotinum, meðan aðrir ikki gera tað. So nú verður spennandi at síggja úrslitið av uratkvøðugreiðsluni*

# Nú avgera limirnir

*Semingsuppskotið, sum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið hava fingið, er nú sent limum Lærarafelagsins til uratkvøðu. Úrslitið av henni verður so tað, nevndin í felagnum fer at halda seg til*

EDVARD JOENSEN

Á limafundi hjá Føroya Lærarafelag mánadagin varð eingin støða tikin til semingsuppskotið, sum komið er í trætuni millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, sigur, at nevndin framman undan fundinum mánadagin hevði samtykt, at avgerðin skuldi takast við uratkvøðu millum limirnar. Og tað varð eisini úrslitið av fundinum.

Hin parturin í málinum, Fíggjarmálastýrið, vildi hava málið avgjørt fyri páskir. Men tað helt lærara-nevndin ikki hava so øgiligan skund. Nú er málið komið so langt, at tey halda, at nú skal tað sleppa at standa sína endaligu roynd.

Tí verður tað nú koyrt fult út, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Lærarafelagið hevur sent liminum atkvøðuseðlar við postinum, og evstamark fyri, nær atkvøðurnar skulu vera aftur hjá felagnum, er hósdagin tann 27. apríl á middegi. Tær atkvøður, sum ikki eru komnar tá, telja ikki við í atkvøðugreiðsluni. Atkvøðunevnd er longu sett, og hon fer at sita klár at telja upp, beinanvegin, farið er um evstamark.

At tað kann tykjast long tíð, kemst av, at páskirnar koma ímillum, umframt at flaggdagurin er triðja páskadag, og tá er Postverkið stongt.

Nevndin í Føroya Lærarafelag hvur latið fult og heilt upp til limirnar at avgera, hvussu teir atkvøða. Tey hava hvørki mælt til ella frá.

Tosað hevur verið um hugtakið ársverk í samband við sáttmálan. Men tað eru fleiri sløg av ársverkum, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag. Og tað er hvat ársverk, talan er um, ósemjan stendur.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at hon veit, at onkur lærari tekur undir við semingsuppskotinum, meðan aðrir ikki gera tað. So nú verður spennandi at síggja úrslitið av uratkvøðugreiðsluni.



*Nógvir lærarar møttu á fundinum í Norðurlandahúsinum mánadagin*

# Búskaparráðið havt sín fyrsta fund

*Nývalda Búskaparráðið hevur skipað seg við Hermanni Oskarsyni sum formanni*

Fyri kortum valdi landsstýrið nýtt Búskaparráð og nú hevur nýggja ráðið havt sín fyrsta fund.

Ráðið skipaði seg við Hermanni Oskarsyni sum formanni. Hini bæði í formansskapinum er Una Joensen og John P. Danielsen.

Hinir limirnir í Búskaparráðnum eru Anfinn Olsen, Anna Kass, Elisabeth Gaardbo og Marner Jacobsen.

Skrivari hjá Ráðnum er Jóannes Jacobsen.

**st**



*Hermann Oskarson nýggjur formaður í Búskaparráðnum*

HEIMA BIO
Leiga videofilmin frá STATOIL á páskum
STATOIL ynskir øllum gleðiligar páskir
VIDEOTOP 10
VIKA 16
1 Star Wars Den usynlige fjende
2 She's all that
3 The Blair Witch Project
4 Runaway Bride
5 Eyes Wide Shut
6 Sex Games
7 EDtv
8 Familie Terapi
9 Asterix og Obelix
10 Austin Powers - The Spy who shagged me
Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00
STATOIL
støðirnar kring landið
petur & petur 320870